# Kíkar leggja til brots aftur

- Flestu føroysku bólkarnir høvdu ensk nøvn, men tað vildu vit ikki. Og hví ikki navnið, Kíkar.. ein grindakíkur flýtur jú altíð omaná, so leingi hann er heilur. Fer hann undir, tí tað rekur nakað hart, kemur hann undan aftur, tá ið rákið linkar aftur, sigur Jóhann Danielsen, sum er sangari í tónleikabólkinum, Kíkar, sum fyrstu ferð hevur verið á palli aftur eftir meira enn 20 ár

DANSUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tónleikabólkurin, Kíkar, sum ikki hevur verið savnaður í meira enn 20 ár, var fyri fyrstu ferð síðan ársskiftið 1984/1985 aftur á pallinum í Losjuni í Gøtu seinasta leygarkvøld, tá ið bólkurin spældi til dans.

Bólkurin var nógv frammi í fyrru helvt av áttatiárunum, tá ið teir spældu til dans eitt nú í Eysturoy, Klaksvík, Havn og Vágum.

Kíkar spældu góðan gamlan 70'ára rokk, so sum Uriah Heep, Deep Purple, Beatles, Doctor Hook og Santana, og nú teir – í hvussu er fyri eina tíð - eru "vendir" aftur, er hetta framvegis tónleikurin teir spæla. Teir spæla eisini eini 2-3 løg hjá Símuni úr Konoy.

Umframt at spæla í Losjuni í Gøtu seinasta leygarkvøld, fara Kíkar eisini at spæla til dans í Glyvra Bio 2. jólakvøld og gamlaárskvøld.

## Royndir í leikum

Teir, sum manna bólkin, eru Jóhann Danielsen, Leirvík (sang), Petur Martin Petersen, Norðragøta (trummur), Jákup Olsen, Runavík (bass) og Hjalti Joensen, Toftir (guitar). Bólkurin hevur eisini fingið aðrar royndar tónleikarar at hjálpa sær, og hesir eru eitt nú Finnbjørn Hansen, Sandavágur (tangentar) og Arni Carlsen, Toftir (tangentar).

Fleiri av hesum eru kend nøvn innan føroyska tónleikaheimin, men hetta er sum nevnt fyrstu ferð, at bólkurin Kíkar er á pallinum aftur í øll hesi mongu ár undir gamla navninum.

Ein av upprunaligu tónleikarunum í bólkinum, Jóhann Danielsen, hevur seinastu 15 árini búð í Danmark, men hann er nú komin heim at venja til dansitiltøkini – tiltakið í Losjuni í Gøtu og tey bæði, sum liggja fyri framman í Glyvra Bio, núverandi Støkk-høllini.

Síðan Jóhann kom heim, hevur dúgliga verið vant í gamla handlinum hjá P.W. í Søldarfirði, har ketlavirkið, Hógv, nú hevur sítt virksemi.

Sosialurin var fram við eitt kvøldið, teir vandu.

## Løgdu botnin

- Vit vandu onkra løtu í summar, men hetta var bara til stuttleikar. Tá vit umsíðir vóru savnaðir aftur, fingu vit faktisk hugskotið at royna okkum aftur á palli. So, vit kunnu siga, at tað var í summar, at vit løgdu botnin til hetta, sum nú gjørdist veruleiki.

Í bólkinum siga teir, at tá ið gamlaárskvøldið í Glyvra Bio er av, er ikki meira á skránni hjá Kíkum fyribils, men tað hongur í luftini, at tað ikki er óhugsandi, at menninir fara at finna saman aftur til okkurt høvið, sum liggur fyri framman.

- Eg eri einar 3-4 mánaðir um árið heima í Føroyum, og tá hava vit høvi at venja, um hugur framvegis verður til tess. So, hvør veit; kanska verða vit við í onkrum ítróttartiltaki komandi summar – ella kanska á G, sigur sangarin, Jóhann Danielsen.

Hann heldur, at tað virkar øðrvísi at spæla í dag, nú hetta bara er til stuttleikar.

- Ja, eg vil siga, at nú hetta ikki er forpliktandi meira, virkar tað meira sum nostalgi at spæla undir navninum, Kíkar, aftur, sigur Jóhann.

## Grindakíkur

Vit spurdu eisini, um navnið Kíkar kanska meiri í dag enn áður hóskar til bólkin, nú teir allir eru vorðnir góð 20 ár eldri – og onkur helst er vorðin nøkur kilo tyngri!

- Ja, tað kann man gott siga, heldur sangarin fyri og flennur.

Hann vísir á, at teir fingu sær navnið Kíkar, tí teir vildu, at bólkurin skuldi hava eitt føroyskt navn.

- Flestu føroysku bólkarnir tá høvdu ensk nøvn, men tað vildu vit ikki. Og hví ikki Kíkar.. ein grindakíkur flýtur jú altíð omaná, so leingi hann er heilur. Fer hann undir, tí tað rekur nakað hart, kemur hann undan aftur, tá ið rákið linkar aftur, sigur Jóhann Danielsen.

Høvið verður sum nevnt aftur at hoyra Kíkar spæla góðan gamlan rokk í Glyvra Bio 2. jólakvøld – og somuleiðis í Glyvra Bio gamlaárskvøld, sum er nýggjársaftan.



*2. jólakvøld og gamlaárskvøld fara teir aftur á pallin. Teir hava vant í gamla P.W. handlinum í Søldarfirði, har ketlavirkið, Hógv, nú húsast*




## Svávulpinnur • Jólamaður • 775 ár

***Lýs teg sjálvan við trimum orðum:***
Glaður, gávumildur og ivaleyst eitt sindur átufrekur

***Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast?***
Tað man vera "Hvat ynskir tú tær til jóla?"

***Hvørjum hyggur tú at hjá Jólakonum?***
Fyrst og fremst skal hon vera fitt, men hon skal eisini duga at gera góðan greyt

***Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?***
Eg skal í klæðini og stivlarnar, tað tekur ikki langa tíð nakrar minuttir, men um eg eisini skal súpa greytin, kann tað taka einar 20 minuttir afturat, tí mær dámar sera væl greyt.

***Hvat ger teg keddan?***
Jólamenn eru so vælsignaðir, at vit gerast ikki ofta keddir, men onkuntíð tá fólk ikki skikka sær pent, tá gerist eg eitt sindur harmur.

***Hvat gleðir teg?***
Tað gleðir meg, tá fólk skikka sær væl og eru góð. Mær dámar eisini væl at fáa ein borðisk við greyti, eitt sindur av tvøsti og sjálvandi eisini spik.

***Nær feldi tú seinast eitt tár?***
Jólamenn gráta ikki, vit duga slettis ikki at gráta, heldur ikki tá vit ganga í hvøssum vindi.

***Nær smakkaði tú tær seinast á?***
Eg drekki altíð jólaøl aftur við greytinum

***Hvat var seinasta ynski, sum tú fekst uppfylt?***
Tað var, tá konan bant mær nýggjar vøttir.

***Hvørji ráð hevur tú til fólk, sum ætla sær at gerast jólamenn?***
Jólamaður verður tú ikki, tú ert antin føddur jólamaður ella verður tú ongantíð jólamaður

***Hvat er besta uppfinningin og hví?***
Tað er skorsteinssóparin, tí uttan hann hevði eg havt eitt sera skitið arbeiði. Men gávumaskinan hjá mær er heldur ikki at forkasta, tað plagdi at vera øgiliga strævið at gera og pakka gávur til øll børnini.

***Hvat hevur tú í lummunum beint nú?***
Eina turra lykkja av tvøsti, eitt petti av sperli og 18 karamellur

***Hvat er títt besta heimaráð?***
Tað er at koyra eitt sindur av smøri á greytin, tað smakkar óført

***Hvussu ofta ert tú hjá frisør?***
Nei, nei, nú fjasar tú, vit jólamenn eru ongantíð hjá hárskera

***Hvør er tín stuttligasta uppliving sum jólamaður?***
Tað er altíð stuttligt at geva børnum gávur, tey gerast altíð so glað. Serliga stuttligt var tí einu ferðina fyri eini 60 árum síðan, eg gav einum lítlum dreingi í Klaksvík ein blokk og blýant. Hann æt Óli og gjørdist so øgiliga glaður. Í ár hevur hann verið so óførur at teknað jólamenn í Sosialinum.